Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Beinta Løwe Jacobsen, løgtingsmaður

Svarari: Bárður á Steig Nielsen, løgmaður

Evni: Fjarskiftisøkið

Spurningar:

1. Hvørja ávirkan hevur danska stjórnin/Fólkatingið á nýggju lóggávuna á fjarskiftisøkinum, sum løgmaður vísir á í ólavsøkurøðuni, og sum verður mett at verða trygdar- og verjupolitikkur?

2. Hvørji onnur yvirtikin málsøki eru, ið verða mett at koma undir trygdar- og verjupolitikk?

3. Hevur danska stjórnin ynskt at vera inn yvir lóggávuna á fjarskiftisøkinum?

Viðmerkingar:
Í løgmansrøðuni greiddi løgmaður frá, at bæði NATO og ES eru á einum máli um, at undirstøðukervið á fjarskiftisøkinum eisini er ein spurningur um trygdar – og verjupolitikk. Áhugavert er at vita, um tað merkir, at danska stjórnin og/ella Fólkatingið nú skulu inn yvir lóggávuna á hesum øki.
Spurt varð um hetta undir viðgerðini av ólavsøkurøðu løgmans. Men fyri at fáa greiðari svar um, hvørjar ætlanir eru á hesum øki, nú løgmaður sigur, at hetta kemur undir trygdar- og verjupolitikk, verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 4. august 2021

Beinta Løwe Jacobsen